TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Starvsfólk til heilsu- og umhvørvisdeildina

Søkt verður eftir starvsfólkum til nýggju heilsu- og umhvørvisdeildina hjá Tórshavnar kommunu. Deildin skal taka sær av heilsu- og umhvørvismálum í kommununi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur ella sum tekniskt hjálparfólk við líknandi útbúgving innan heilsu- og umhvørvi.

**Royndir**
Tað er umráðandi, at umsøkjarin hevur royndir innan arbeiðið við heilsu- og umhvørvismálum og innan almenna fyrisiting.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:
- kann arbeiða sjálvstøðugt og hugsa skynsamt
- er fyrikomandi
- virkar í góðum samstarvi við starvsfelagar og onnur sum arbeiða hjá kommununi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekn. stjóra ella Boða Haraldson, býarverkfr. á tlf. 315160.

**Kommunan bjóðar**
2 áhugaverd størv, har nýggir starvsfelagar kunnu vera við at seta dám á arbeiðslagið á einari nýggjari deild.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum tilmælum skulu vera Tórshavnar komunu í hendi í seinasta lagi hósdagin 25. mars 2002. Viðmerkjast skal á brævbjálvan: "umsókn um starv til heilsu- og umhvørvisdeild".

SNARSKIVAN



Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið



Turkitrumla
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan temperatur
prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460


**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

A. Navn: P/F 20.12.2001 (P/F-nr. 3293), Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn.

og

B. Navn: Føroya Sparikassi ( 2500), Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F- lógini.

Skráseting Føroya tann 6. mars 2002

Kristin Balle


Lesið internet Sosialin !





## P/F Frants Restorff

## Vit sóknast eftir fólki til fast starv til handilin

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
kl. 06.00–13.00, kl. 13.00–19.00
kl. 19.00–23.30. Allar dagar í vikuni.

Løn eftir S og K

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Tlf. 311060
Postmoga 41 · 110 Tórshavn

frants restorff


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3328
Navn: Sp/f Karmur
Adressa: 660 Søldarfjørður
Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 14.02.2002
Viðtøkudato: 14.02.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Sigurd Sørensen, 512 Norðragøta og Jónsvein Poulsen, 530 Fuglafjørður.
Nevnd: Jónsvein Poulsen, 530 Fuglafjørður (formaður), Sigurd Sørensen, 512 Norðragøta og Jannie Andreassen, 512 Norðragøta.
Stjórn: Sigurd Sørensen, 512 Norðragøta.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 14.02.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og ídnað og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. mars 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3329
Navn: Sp/f MiaRosa
Adressa: 600 Saltangará
Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 01.03.2002
Viðtøkudato: 01.03.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Rodmundur Nielsen, Sýnarvegur, 625 Glyvrar og Sofus T. Hansen, Leitisvegur, 625 Glyvrar.
Stjórn: Rodmundur Nielsen, Sýnarvegur, 625 Glyvrar og Sofus T. Hansen, Leitisvegur, 625 Glyvrar.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær ella í felag.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.03.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, við serligum denti á bakaravirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 5. mars 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3326
Navn: Sp/f KBI
Adressa: Traðargøta 29, 700 Klaksvík
Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 28.02.2002
Viðtøkudato: 28.02.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Karl birgir Ziska Isaksen, Traðargøta 49, 700 Klaksvík.
Stjórn: Karl Birgir Ziska Isaksen, Traðargøta 49, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : P/F Føroyabók, v/ Victor Nielsen, Vágstún 2, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 28.02.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, ídnað, veita tænastur og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. mars 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3327
Navn: Sp/f Reklamuprent
Adressa: 512 Norðragøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 07.02.2002
Viðtøkudato: 07.02.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Poul Helgi Jacobsen, 512 Norðragøta.
Stjórn: Poul Helgi Jacobsen, 512 Norðragøta.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 07.02.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka reklamuvirki, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. mars 2002

Kristin Balle


www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo




Toll- og Skattstova Føroya

# Avloysari sum skrivari

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
• skattalógina
• tolllógina
• mvg-lógina
• kolvetnisskattalógina
• avgjaldslógirnar, eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast,eru 30 starvsfólk.

*Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo*

*E-mail: tollskatt@tollskatt.fo*

Søkt verður eftir barnsburðaravloysara sum skrivari á Lógardeildini at setast skjótast til ber og fram til 1. oktober 2002.

**Arbeiðsuppgávur**
Skrivarin røkir m.a. hesar uppgávur:
- heldur skil á málum
- fyrireikar mál
- skrivar brøv
- setir upp rundskriv, kunningarskriv, vegleiðingar o.a.
- rættlesur og umsetir t.d. brøv, viðmerkingar til lógir o.a.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
- duga væl at málbera seg á føroyskum
- setir seg skjótt inn í ymisk viðurskifti
- sjálvstøðugan arbeiðsháttt og kann raðfesta arbeiðið
- góð samstarvsevni
- dugir at nýta Microsoft Word og Outlook - hetta er ein fyrimunur ikki eitt krav
- royndir sum skrivari er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Anju Hovgaard, deildarstjóra, á tlf. 35 26 00.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi mikudagin, 20. mars 2002.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Traðagøta 39
Postboks 2151
FO-165 Argir



Hotel Føroyar ★★★★

## Starv

## YVIRTÆNARI

*Søkt verður eftir yvirtænara til okkara matstovu at byrja skjótast tilber.*

***Starvið***
*Talan er um eitt leiðarastarv við tilvísing til stjóran. Yvirtænarin fær ábyrgdina av:*
- *Eini professionellari kundatænastu, sum svarar til eitt hotel við 4 stjørnum*
- *Rakstrinum av matstovuni, veitslu- og fundarvirkseminum*
- *Vøruinnkeypi og vørugoymslum*
- *Starvsfólkaviðurskiftum*
- *Øðrum viðkomandi uppgávum*

***Umsøkjarin hevur***
- *Viðkomandi útbúgving*
- *Leiðsluroyndir, vilja og evni til at royna nýggjar leiðir*
- *Góðan kunnleika til mat og vín*
- *Góðan teldu- og málkunnleika*
- *Professionellan hugburð*
- *Góð samstarvsevni*

***Vit bjóða***
- *Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv*
- *Fakligar avbjóðingar*
- *Eitt dynamiskt arbeiðspláss*
- *Gott samanhald*
- *Kappingarførar setanartreytir*

*Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Johannes Jensen, stjóri á 31 75 00.*

*Umsókn sendast til:*

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*FO-110 Tórshavn*

*innan 18. mars 2002.*

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Hotellið hevði í 2001 2,5 mió. í rakstraravlopi og eina eginogn uppá DKK 8,4 mió. Miðaltal av starvsfólki í fjør var 46.*

petur & petur • 320870



# Frá Føroya Psoriasisfelag

6. apríl verður aftur farið til Íslands til viðgerð fyri psoriasis.

Tey, ið hava tørv á viðgerð og kundu hugsa sær at komi við, skulu fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir út umsóknarblað og sendir tað til Landssjúkrahúsið.

Umsóknin skal vera Landssjúkrahúsinum í hendi seinast 11. mars.

Eru ivaspurningar ber til at ringja á tlf. 424179

Vinarliga

**Føroya Psoriasisfelag**



BRÚKSLUTIR
til stoypiuppgávur
Forskallingsoljur
Konus, avstandsrør, proppar
Binditráður
Bindimaskinur
Kaj Andreasen & Co



Í BÝIN
hvønn hósdag !



Sosialurin



HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo